# Kunning um ólavsøkuna




## i um ferðslu á ólavsøku

**Rennikapping** fríggjadagin 27. juli kl. 17.30-20.00, verður parkeringsøkið á Skálatrøð stongt fyri allari ferðslu.

**Súkklukapping** fríggjadagin 27. juli kl. 17.30-21.00, verður ferðslan til handilsøkið á Hálsi nógv tarnað. Heykavegur, Staravegur, Falkavegur og Tjaldursvegur verða stongdir.

**Kappróðurin** ólavsøkuaftan (millum kl. 14.00 og 19.00), er Eystara Bryggja stongd fyri vanligari bilferðslu frá Kongabrúnni til Jónas Broncks gøtu. Somuleiðis er ikki loyvt at parkera á parkeringsøkinum á Bursatanga frá 27. juli kl. 20.00 til ólavsøkudag kl. 9.00.

Ólavsøkuaftan, 28. juli, frá kl 14.00 til kl. 8.00 morgunin eftir og ólavsøkudag, 29. juli, frá kl 10.00 til kl. 8.00 morgunin eftir, eru hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er ikki loyvd eftir Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í Mylnugøtu, í Niels Finsens gøtu frá Vaglinum og niðan til Auto, í Tórsgøtu frá Sverrisgøtu oman í Vágsbotn. Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er ikki loyvd tvørtur um Niels Finsens gøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún, undantiknir eru hýruvognar, Bussleiðin og Bygdaleiðir. Um hetta vegamótið gongur nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi. Í Niels Winthers gøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

**Bussleiðin**
Fríggjadagin 27. juli, frá kl 17.50, leygardagin 28. juli (ólavsøkuaftan) og sunnudagin 29. juli (ólavsøkudag), koyrir Leið 1 oman eftir Dalavegnum í staðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.

Leygardagin 28. juli (ólavsøkuaftan) koyrir Leið 1 seinasta túr av Hamrinum kl. 13.50, Leið 2 koyrir seinasta túr av Argjum kl. 14.05 og Leið 3 koyrir seinasta túr av Norðasta Horni kl. 14.05.

Sunnudagin 29. juli (ólavsøkudag) koyrir Leið 1 fyrsta túr kl. 11.50 og Leið 2 og 3 koyra fyrsta túr kl. 12.05

## WC á ólavsøku

Á ólavsøku hevur Tórshavnar kommuna wc-vognar standandi ymsa staðni í býnum.

**Vognarnir standa á hesum støðum:**
P-økið við Sjónleikarhúsið, í Kommunuskúlagarðinum og P-økinum við J. Paturssonar gøtu.

Harumframt verða kommunalu wc-ini opin í Kiosk Steinatúni og í Mylnugøtu.

## undir midnáttarsanginum

Midnáttarsangurin á Vaglinum ólavsøkukvøld er millum størstu tiltøk í Føroyum.

Samarittarnir hjá Reyða Krossi eru eisini á Vaglinum. Reyði Krossur hevur tríggjar støðir, soleiðis at tað altíð ber til at veita skjóta hjálp.

Telefon **112** ella **351448.**

Ansið væl eftir tykkum og tykkara næstrafólki.

**Sanghefti til midnáttarsangin**
Sanghefti til midnáttarsangin á ólavsøku eru at fáa í Ráðhúsinum og í Býráðssalinum, meðan opið er ólavsøkudag millum klokkan 15.00 og 18.00. Eisini fáast sanghefti í samband við sangløtuna á midnátt ólavsøkukvøld. Tá fara skótar at býta út á trappuni uttan fyri Býráðssalin og við Tinghúsvøllin.

## á ólavsøku

Móttøkuhúsið hjá Tórshavnar kommunu í Tróndargøtu er opið ólavsøkudag millum klokkan 15.00 og 18.00, har høvið verður at síggja listasavnið í húsinum og húsið annars. Eisini Ráðhúsið og Býráðssalurin eru opin ólavsøkudag klokkan 15.00 til 18.00.

Góða ólavsøku!

**Tórshavnar kommuna**